## Suspendering ógildað

Rektarin á Sjúkrarøktarfrøðiskúlanum tók ikki ta røttu avgerðina, tá hon gjørdi av at suspendera leiðaran á Heilsuskúlanum, Susanne Høgh Olesen, tí nakrir lærarar á skúlanum høvdu sent rektaranum kæru um leiðaran. Mentamálaráðið hevur tí ógildað suspenderingina. Ráðið sigur, at deildarleiðarin bleiv ikki hoyrdur, áðrenn hon bleiv suspenderað, og avgerðin stóð heldur ikki mát við avleiðingarnar av suspendering, sigur ráðið.

## Úr Fólkaflokkinum

Í tvey ár var Heðin D. Poulsen formaður í valfelagnum hjá Fólkaflokkinum í Suðurstreymoy, og hann hevur eisini verið í Løgtinginum sum varamaður fyri Óla Breckmann. Men nú hevur hann meldað seg úr Fólkaflokkinum, tí hann er misnøgdur við politikkin hjá flokkinum. Við Dimmalætting sigur hann, at tað var serliga tann nýggja búnaðarlógin, sum fekk bikarið at flóta yvir, tí hon er ikki nóg víðgongd og framskygd.

# Hamstrað bensin kann vera brandfella

**Brúka fólk tilvildarligar dunkar til hamstraða bensinið, er stórur vandi fyri at dunkarnir fara at leka og at bensinið eksploderar**

BRUNATRYGD
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Beinsinsølurnar hava selt upp í 10 ferðir so nógv bensin sum vanligt seinastu dagarnar. Men verður bensinið ikki goymt forsvarligt, er stórur vandi fyri at dampurin festir í og spreingist*

Í berum verkfallsótta hava fólk lagt bensin inn undir seg í stórum nøgdum. Men eru dunkarnir ikki góðkendir, er stórur vandi fyri, at bensini etsar hol á dunkarnir, so tað lekur út, antin sum veska ella vandamikil dampur.

– Goymið bensini í góðkendum dunkum og brúkið tað sum skjótast, ljóða ráðini frá Brunaumsjónini og oljufeløgunum.

Bensinsølurnar kring landið hava havt úr at gera seinastu dagarnar, og longu bilbíðirøðirnar hava víst, at tað hevur verið um at gera hjá fólki at fylla tangar og dunkar við bensini. Og oljufeløgini hava havt um at vera at fylla olju í tangarnar á skipum, og hjá privatfólki og stovnum.

Sambært Niels Juel Nattestad, stjóra í Statoil Føroya, so seldu teirra bensinsølur í gjár eins nógv bensin enn vanligt.

Vit seldu eins nógv og til 10 dagar, ella einar 300.000 litrar, sigur hann.



*Niels Juel Nattestad, stjóri í Statoil, sigur, at tendringspunktið hjá brennievni verður býtt í tríggjar bólkar, har bensinið kemur undir eldfimasta bólkin*



*Hákun Djurhuus, stjóri í Shell, heitir á fólk um at fylla bensinið í bilarnar sum skjótast, ella at gera eitt gerðabýti, so onkur annar kann brúka tað*

### Tendrar við brestin

Hann sigur, at um fólk hava keypt bensin upp í dunkar, so hevur tað ómetaliga stóran týdning, at tey ikki liggja inni við bensini, sum verður goymt í tilvildarligum íløtum.

- Tendringspunktið hjá brennievni verður býtt upp í tríggjar bólkar, har bensin verður bólkað í eldfimasta bólkin. Tað kann festa í við lægri enn 21 stigum, og enntá eisini við minusstigum, sigur Niels Juel Nattestad.

- Bensindampur tendrar við brestin, um neisti kemur at! Hav tí bensinið í góðkendum dunkum og undir uppsýni. Eisini fyri at forða børnum at koma at tí. Set eisini frámerki á dunkin, so øll vita, at her er talan um bensin, sigur Niels Juel Nattestad, sum annars heitir á fólk um at brúka bensini sum skjótast.

### Forskotin søla

Hákun Djurhuus, stjóri í Føroya Shell, sigur, at sølan hjá teimum eisini hevur verið góð seinastu dagarnar. Talan hevur tó ikki verið um eykasøla, men sølan hevur forskotið seg nakað.

- Nú rokna vit við, at sølan verður nakað lakari næstu vikurnar, tí fólk hava fylt upp, har tað ber til, sigur hann.

Báðir olju-stjórarnir eru tó samdir um, at tað hevur stóran týdning, at ávara fólk ímóti vandanum við at goyma bensin í tilvildarligum dunkum heima í kjallarum ella garagum.

- Tá fólk bunkra bensin, ber til at keypa góðkendar dunkar frá okkum. Verða vit varug við, at fólk fylla upp í tilvildarlig íløt, so gera vit sjálvsagt vart við tað. Men sum øllum kunnugt, so síggja starvsfólkini á støðunum ikki alt sum fyriferst úti á uppfyllingarplássinum, sigur Hákun Djurhuus.

- Fyll bensinið í bilarnar sum skjótast, og brúkið tað annars beinanvegin. Ella ger eitt gerðabýti, so onkur annar kann brúka tað, sigur Hákun Djurhuus.

Hann greiðir eisini frá, at fólk skulu ikki fara í panikk, um tey hava keypt alt ov nógv, og stúra fyri at brenna inni við tí.

- Tá ber eisini til at venda sær til brennistøðina, IRF ella til bilverksmiðjurnar, sum kunnu vegleiða um, hvussu fólk kunnu beina fyri bensininum, ella goyma tað trygt, sigur hann.

Bæði oljufeløgini upplýsa annars, at tað ber ikki til at lata keypt bensin inn aftur, tí tá kunnu feløgini ikki tryggja, at góðskan er í lagi.

### Greiðar reglur

Sambært Búgva Heðinson Johannesen, málsviðgera í Brunaumsjónini, so veldst vandin um, hvussu bensini verður goymt.

- Lóggávan er púra greið. Tað er bert loyvt at goyma 25 upplagseindir ella litrar av bensini í kjallaranum ella í garaguni í senn, og tá skal tað vera í góðkendum dunkum. Viðvíkjandi diesel, er vandin ikki so stórur, og tá er mest loyvda nøgdin eisini 25 upplagseindir ella 125 litrar. Tó kanst tú ikki bæði goyma 25 l av bensini og 125 l av diesel inni samstundis, tað er í mesta lagi 25 upplagseindir av eldfimun løgi.

Hann sigur, at vandin við at goyma bensin í ikki góðkendum dunkum kann vera, at bensini kann etsa hol á plastikki. Tá kann tað leka úr, bæði sum veska, men eisini sum dampur. Bensin er sera eldfimt, og tað skal ikki meira enn ein neisti til at tendra í. Eru umstøðurnar goymslurúminum viðvíkjandi iltinnihaldi og hita til vildar, so er vandi fyri eldi og spreinging.

Á heimasíðuni hjá Brunaumsjónini er reglugerðin at finna: "Serfyriskipan fyri eldfiman løg, § 3.2.2, a)"